| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>14. apríl 2011 | Blað nr.:<br>**8996**<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** **14. apríl 2011** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:70/11-88/11**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Maria H. Olsen
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Vagnur Johannesen, ið var uttanlands

**LUTTÓKU EISINI:**
Heri Olsen
Tina Johannesen
Jóan Petur Hentze
Bjørgfríð Ludvig

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**74/11** **2011-0217**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 14. apríl 2011:** Tikið til eftirtektar.

**75/11** **2008-4922**

**Avlýsing av servituttum á matr. nr. 749b og 749c, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Omanfyri nevnda ogn er seld til Beintu Malenu Sørensen í 2008, og hevur kommunan tá góðtikið søluna. ( Tinglýstur servituttur um víðari sølu )

Ymiskir gamlir og ótíðarhóskandi servituttir liggja á ognini. Servituttirnir eru tinglýstir í 18.08.1914 – 15.07.1919 og 20.01.1920 og eru nógvum førum søguligir og ikki nútíðarhóskandi.

Harumframt eru servituttir tinglýstir fleiri ferðir á ognirnar, soleiðis at talan er um fleiri løg av servituttum sum í fleiri førðum yvirlappa.

Poul Hansen advokatur, hevur tí heitt á kommununa um at:

- strika servituttirnar frá 18.08.1914 á bæði matr. nr. 749 b og c, vísandi til at tað er eitt mistak, at teir eru lýsir á hesar ognir.
- strika servituttirnar frá 15.07.1919 á matr. nr. 749b, tí teir hoyra til 749 c, Tórshavn.
- strika servituttirnar frá 20.01.1925
- á matr. nr. 749c, tí teir hoyra til 749 b.

Poul Hansen viðmerkir, at av servituttunum frá 1919 eru tað í mesta lagi nr. 2 um hegnskyldu, nr. 3 um kloak og vatnleiðingar gjøgnum stykkið, og nr. 6 um regulering av Havnará, sum kannska enn kunnu hava týdning.

Hann metir eisini at av servituttunum frá 1925 eru tað í mesta lagi nr. 4. um hegnskyldu, nr. 5 um kloak og vatnleiðingar og nr. 9. um regulering av Havnara, sum enn kunnu hava týdning.

Harumframt verða allir servituttir við nøkrum undantøkum strikaðir.

Servituttir frá 1919, sum hereftir verða eftir á matr. nr. 749c, Tórshavn.

Nr. 2. um hegnskyldu.
Nr. 3. um vatn og kloakkleiðingar gjøgnum stykkið.
Nr. 6. um regulering av Havnará.

Servituttir frá 1925, sum hereftir verða á matr. nr. 749b, Tórshavn.

Nr. 4 um hegnskyldu.
Nr. 5 um vant og kloakkleiðingar gjøgnum stykkið.
Nr. 9 um regulering av Havnará.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at koyra málið í avarandi faknevndir.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- strika servituttirnar frá 18.08.1914 á bæði matr. nr. 749 b og c, vísandi til at tað er eitt mistak, at teir eru lýstir á hesar ognir.
- strika servituttirnar frá 15.07.1919 á matr. nr. 749b, tí teir hoyra til 749 c, Tórshavn.
- strika servituttirnar frá 20.01.1925 á matr. nr. 749c, tí teir hoyra til 749 b.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars. 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**76/11** **2011-0400**

**Skriv frá Bjørn á Heygum, adv. , við fyrispurningi um kommunan er sinnað at ogna sær vegin á matr. nr. 1305r, Breiðablik.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Bjørn á Heygum, adv. og bústjóri í Sp/f. Debes í konkurs, hevur við skrivi 7. februar. 2011, vent sær til kommununa, við fyrispurningi um kommunan er sinnað at yvirtaka vegin á matr. nr. 1305r, Breiðablik.

Hann førir í skrivinum fram, at "vegurin liggur í veruleikanum harraleysur, tá búgvið er insolvent og ikki kann átaka sær nakrar skyldur í sambandi við viðlíkahald, ábøtur v.m."
Bústjórin er sinnaður at lata kommununi vegin uttan nakað gjald og sambært bústjóranum strika veðhavararnir veðið. Yvirtekur kommunan vegin, útvegar bústjórin kommununi skeytið.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin av løgdeildini mæla til, at málið verður beint í avvarandi faknevnd.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Víst verður til undanfarnar samtyktir hjá teknisku nevnd og eftirfylgjandi býráðssamtykt frá 13. september 2007 (sí j. nr. 2000-2712/13), um almennar leiðreglur fyri yvirtøku av privatum vegum, har ásett er, at privatir vegir kunnu yvirtakast, um teir, umframt at lúka treytirnar í almennu byggisamtyktini, eisini við atliti til dygd, skulu lúka vanligar tekniskar treytir og í aðrar mátar ikki eru ein náttúrligur partur av privatum grundstykki.

Vegurin Breiðablik, matr. nr. 1305r, Tórshavn lýkur treytirnar í almennu byggisamtyktini og verður mettur at hava nøktandi tekniska dygd til at verða yvirtikin av Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Av tí at vegurin hevur ta dygd, sum krevst til ein tílíkan íbúðarveg, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini til, at kommunan yvirtekur vegin sum hann liggur, í núverandi líki, uttan kostnað fyri kommununa, og uttan nakrar skyldur mótvegis panthavarum ella øðrum pørtum.

**Tekniska nevnd 10. mars 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

77/11 **2011-0731**

**Framfluttar játtanir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2010 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2011.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2010.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta framflyting av t.kr. 31.470, netto, til rakstur og t.kr. 123.046, netto, til íløgur.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

78/11 **2011-0662**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2011**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 24. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

79/11 **2010-0231**

**Útiborðreiðing í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Seinastu árini er áhugin fyri útiservering hjá matstovum og caféum øktur munandi. Àhugin er serliga í miðbýarøkinum í Havn og skapar hetta meir lív í býnum og økir eisini um fjølbroytni av tilboðum í kommununi.

Sum støðan er í dag, hevur kommunan onga reglugerð viðvíkjandi útiservering, og verða umsóknir um útiservering viðgjørdar hvørjum sær. Fyrisitingin er nú farin í holtur við at gera reglugerð um útiservering í Tórshavnar kommunu og væntandi verður hon liðug í hesum árinum.

Í politiviðtøkuni fyri Tórshavn frá 12. marts 1975, sum seinast broytt 19. oktober 1992 stendur í § 41.2) Beværtninger skal holdes lukket fra kl. 24 til kl. 5. Politiet kan med kommunalbestyrelsens samtykke tillade længere åbningstid.

À Býráðsfundi 19. november 1992 bleiv samtykt, at kommuna skuldi virka fyri halgidagslóg, ið hóskar til dagsins viðurskifti, og samstundis at heita á loyvismyndugleikarnar um í millumbilum at góðkenna hesar afturlatingartíðir:

Nátt fyri gerandisdagar kl. 24.00
Nátt fyri leygardagar og halgidagar kl. 4.00

Og soleiðis, at undantaksloyvi frá nevndu tíðum ikki kann verða givið uttan við góðkenning býráðsins í hvørjum einstøkum føri.

Hesar afturlatingartíðir eru galdandi og hava fleiri matstovur loyvi at hava opið til kl. 4 í vikuskiftunum.

Tá býráðið í 1992 samtykti longri afturlatingartíð var ikki komið uppá tal, at matstovur og onnur kundu hava útiservering, og í tí sambandinum ynskir fyrisitingin at støða verður tikin til nær á árinum útiservering skal verða loyvd og nær á kvøldið latast skal aftur. Somuleiðis ynskist at støða verður tikin til, at umsóknarfreistin fyri at søkja um útiservering fyri 2010 er 1. mars. Hetta fyri at fyrisitingin skal kunna hava tíð til at viðgera málini.

Fyrisitingin hevur kannað nær útiserveringarstøð í grannalondum skulu lata aftur um kvøldarnar.

| Stað | Afturlatingar tíðir útiservering | Árstíð |
|---|---|---|
| Keypmannahavn | Kl. 24 | Alt árið |
| Århus | Kl. 22 Søkjast kann um longda upplatingar tíð. Sun.-hós. til kl. 24 og nátt til frí. og leyg. kl. 2. | |

| | | |
|---|---|---|
| Odense | Kl. 01 (24.00) | 1. apríl – 30. oktober |
| Oslo | Kl. 24 (í býarkjarnu. Skal verða afturlatið millum kl. 24 og 6)<br>Kl. 22 (uttanfyri býarkjarnu) | 1. apríl – 30. sept.<br>1.oktober- 31.mars |
| Stavanger | Kl. 23 vikudagar og<br>Kl. 23 sun. og heilidag | 1. apríl til 30. september |
| Stockholm | Alkoholforboð úti á torgum o.t. er vanliga kl. 22. Aðrar umsóknir verða viðgjørdar av umhvørvis-myndugleikunum viðv. ljóðampum. | Maj til september |
| Gøteborg | Ljóðmark 55 dBA aftaná kl. 22.00 útiservering | 1. apríl – 31. oktober og<br>1. november – 31. mars |
| Malmø | Kl. 23 sun. - hós.<br>kl 1 nátt til leyg. og sun. og kvøld áðrenn heilidag | 15. mars – 31. oktober |
| Reykjavík | Kl. 22. og kl. 23.30 í vikuskiftum | |

Umsitingin kunnar um málið og kemur við tilmæli á fundinum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. februar 2010:** Nevndin samtykti at útseta málið til næsta fund.
Jan Christiansen var ikki við til viðgerð av hesum málið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at umsóknir um útiservering, sum skulu avgreiðast áðrenn summarfrítíðina 2010 (t.e. áðrenn 1. juni), skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2010. Umsóknir, ið koma inn eftir freistina, kunnu ikki vænta at loyvi verða avgreidd fyri summarið 2010.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. februar 2010:** Málið varð umrøtt. Málið verður tikið upp aftur til viðgerðar, tá uppskot til reglugerð fyriliggur.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur hevur gjørt uppskot til reglugerð um útiborðreiðing í almenna rúminum í Tórshavnar kommunu.

Við reglugerðini (j. nr. 2010-0231/3) hevur kommunan stungið út í kortið, hvussu hon ynskir at útiborðreiðingin skal mynda kommununa.

Í henni eru settar felags treytir til virksemi, soleiðis at tey sum ynskja at leiga øki frá kommununi til útiborðreiðing, hava sama grundarlag at halda seg til.

Við hesum átti at verið lættari hjá umsøkjaranum at kunna seg um hvørji krøv kommunan setur, hvørjar upplýsingar kommunan skal hava tá søkt verður, og skjótari hjá umsøkjaranum at fáa umsóknina avgreidda.

Eitt kort er gjørt yvir økir í Tórshavn, har søkjast kann um útiborðreiðing. Við hesum verður latin umsitingini ein generell heimild at viðgera umsóknir um útiborðreiðing á kommunalum øki og verður tískil ikki longur neyðugt at leggja hesar fyri nevnd til politiska støðutakan í hvørjum einstøkum føri.

Umsóknir um útiborðreiðing á bygd verður viðgjørd serskild í hvørjum einstøkum føri.

Á fundinum leggur fyrisitingin fram uppskot um reglugerð fyri útiborðreiðing.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við reglugerðini.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, men mælir til, at greinin um nýtslukostnaðin verður broytt og at tað ístaðin verður víst til kostnað, ið verður ásettur av kommununi. Nevndin beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd til viðmerkingar, at leggja fyri nevndina aftur.
Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen vóru ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Ískoyti:**
Málið verður framlagt til umrøðu í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Kunnað var um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2010:** Kunnað var um málið.

**-Ískoyti:**
Uppskotið til reglugerðina hevur verið til hoyringar hjá áhugabólkum. Viðmerkingar til reglugerðina eru komnar frá Ferðavinnufelagnum, Loyvisnevndini, málsviðgera á loyvisdeildini hjá Politiinum í Føroyum, Brunaumsjón landsins, Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Harumframt hava stjórn, Vinnumenningardeildin og Tekniska umsitingin gjørt viðmerkingar.

**Niðanfyri er drigið samanum:**

**Klokkutíðir:** Viðmerkingarnar til klokkutíðirnar eru ymiskar. Uppskotið leggur upp til kl. 24 í vikuskiftum. Ferðavinnuráðið mælir til kl. 2-3, og spurningur er

settir um klokkutíðirnar eru í samsvari við visiónina hjá kommununi, um at býurin skal verða virkin og vakin.

Klokkutíðirnar í uppskotinum til reglugerð er í samsvari við §41.2) í Politiviðtøkunum, sum sigur "*Beværtninger skal holdes lukket fra kl. 24 til kl. 5. Politiet kan med kommunalbestyrelsens samtykke tillade længere åbningstid.*".

Uppskotið viðvíkjandi afturlatingartíðum eru á leið tær somu, sum eru galdandi í høvuðsstøðunum í grannalondum okkara. Klokkutíðirnar eru settar fyri eitt nú at minka um ljóðampar frá náttarvirksemi.

**Kostnaður:** Spurningur verður settur til um hetta at taka leigugjald fyri økið, er í samsvari við visiónina hjá kommununi.

**Reglugerðin:** Reglugerðin skal eftirmetast regluliga, og fyrstu ferð eitt ár eftir hon er komin í gildi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars 2011:** Nevndin samtykti at viðmæla uppskotinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við reglugerðini.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 15. mars 2011:** Nevndin samtykti at viðmæla uppskotinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til at taka undir við reglugerðini.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og áseta nýtslukostnað áljóðandi 200 kr. fyri fermeturin um árið.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**80/11** **2011-0617**

**R.C. Effersøes gøta: Ábøtur frá Húsagøtu norður til Tjaldursveg.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
R. C. Effersøes gøta, frá Húsagøtu norður til Tjaldursvegin, er í so ringum standi, at vegurin skal asfalterast í ár. Í tí sambandi hevur umsitingin mett at tað hevði verið praktiskt at gjørt tey arbeiðir, ið áttu at verið gjørd áðrenn asfaltering, so tað eftirfylgjandi ikki skal skerast í asfaltið, ið skal liggja í nógv ár framyvir.
Arbeiðir, ið áttu at verið gjørd:

1. Betra um trygdarviðurskiftini við vegamóti R.C. Effersøes gøta – Gundadalsvegur, ið eru vánalig. Fleiri klagur eru komnar inn.
2. Betra um trygdarviðurskiftini við vegamóti R.C. Effersøes gøta – Húsagøta, ið eru vánalig. Fleiri klagur eru komnar inn.
3. Gera oyggjar at skilja ferðsluna at og fáa ferðina niður.
4. Gera gongu- og súkklubreyt í eystaru síðu.
5. Gera súkklubreyt i vestaru síðu.
6. Leggja kloakk í eystaru síðu, har serliga yvirflatuvatn ger skaða á vegin.

Í 2010 gjørdi ein praktikantur eitt uppskot til ferðtálman av R.C. Effersøes gøtu, ið vísir áleið hvørja loysn umsitingin ynskir, sí j. nr.: 2011-0617/1-1.

**Fíggjarligt:**
Umsitingin hevur gjørt eina kostnaðarmeting, har arbeiðini 1-3 og 6, eru mett at kosta kr. 1.300.000, asfaltering ikki íroknað. Arbeiði 1-3: kr. 900.000 og arbeiði 6: kr. 400.000. Sí annars j. nr.: 2011-0617/2. Arbeiði 4 og 5, at gera gongu- og súklubreyt, verða gjørd eftirfylgjandi av rakstri, um ikki í 2011 so í 2012.
Asfaltdeildin metir at kunna spara áleið kr. 150.000 av asfalteringskostnaðinum (sí j. nr. 2011-0617/3).

**Tilmæli:**
Mælt verður til at farið verður undir at gera omanfyri standandi arbeiðir nr. 1 til 3, fíggjað av rakstri á deild 6810, 6811 og 8110 og arbeiði nr. 6 fíggjað av kloakk íløgum fyri 2011.

**Tekniska nevnd 10. mars 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um ferðslunevndina og fíggjarnevndina.

**Ferðslunevndin 22. mars 2011:** Útsett.

**Ferðslunevndin 31. mars 2011:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskotinum (uppskot nr. 31.03.11/1 mál nr. 2011-0617/8). Ferðslubólkurin arbeiðir víðari við uppskotinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 400.000 av konto 6875, íløgur í kloakkir.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**81/11** **2011-0952**

**Trivnaðartiltøk**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Góð og fjøltáttað trivnaðartilboð hava stóran týdning fyri trivnaðin hjá tí einstaka. Tí eigur stórur dentur at verða lagdur á at hava góð og fjøltáttað trivnaðartilboð til allar aldursbólkar.

Hetta kann gerast við at skapa trivnaðarøkir í býnum, har børn, vaksin og eldri kunnu spæla og venja í tryggum umhvørvi. Ætlanin er at seta ymisk amboð upp og serlig spælipláss, ætlað rørslu og spæli.

Sum heild er endamálið eisini at fremja heilsugóðan livihátt við at fáa so nógvir borgarar sum gjørligt at røra seg meira í gerandisdegnum. Hetta er eisini fyribyrging av skjóttvaksandi sonevndum vælferðarsjúkum.

Fyri børnini er ætlanin at seta ein stóran “bólt” upp, sum er bygdur upp av klatrineti. Børn og ung kunnu klatra í bóltinum og við hesum røra seg og styrkja teirra motorik og fatan av fjarstøðu.

Fyri tey vaksnu og eldru er ætlanin at seta amboð upp á náttúruøkjum í býnum, sum vaksin og eldri kunnu nýta til at styrkja kondition og vøddar. Amboðini eru gjørd til at standa uttandura og eru tryggjað móti veðri og stuldri.

Nøkur av amboðunum eru serliga væl egnað til eldri borgarar. Hugsanarhátturin er, at um fortreytirnar fyri motión og javnvágrørslum eru góðar, so gongur dagligdagurin hjá teimum eldru eisini lættari. Hetta styrkir tey eldru í at klára seg sjálvi sum longst.

Sum heild eru tilboðini kreativ og eggja borgarum at røra seg á ein stuttligan og lættatkomiligan hátt.

Tað er týdningarmikið, at økini liggja tætt við, har fólk ganga og koma framvið. Økið skal bera dám av at vera eitt alment øki, og ikki lagt av til eitt nú ítróttarøki. Trivnaðartilboðini eru ætlað øllum aldursbólkum.

Møgulig økir verða umrødd á fundinum.

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til at játta 1 mill. kr. til verkætlanina at gera trivnaðarøkir í býnum við amboðum og spæliplássum at fíggja av íløgukonto 6275 Fríðkan av býnum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta 1 mill. kr. til verkætlanina at gera trivnaðarøkir í býnum við amboðum og spæliplássum at fíggja av íløgukonto 6275 Fríðkan av býnum.

**Ískoyti:**
Uppskot um staðseting av trivnaðarøkjum sambært fíggjarnevndarsamtykt 6. apríl 2011, verður lagt fram.
Verkætlanin verður fíggjað við at flyta áður játtaða peningin av lokaðum verkætlanum í 2010 til Vaglið (j. nr. 2010-2717), verkætlan nr. L62014, til hesa verkætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarnevndini 6. apríl 2011.

Nevndin samtykti eisini, at umsitingin lýsir málið um staðsetingar nærri til komandi fund.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin mælir fíggjarnevnd og býráð til at taka av tilboði frá Innspark uppá rørsluamboð uttandura á kr. 308.450. Harafturat kemur mvg, frakt og kostnaður fyri at gera lendið klárt.

Harafturat verður biðið um heimild til at bjóða rørsluamboð til eldri og spælipláss út millum 3-4 tilboðsveitarar innan økið og taka av tí lægsta, sum lýkur ásett krøv – og innan fyri ásettan karm.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og taka av tilboði frá Innspark uppá rørsluamboð uttandura á kr. 308.450. Harafturat kemur mvg, frakt og kostnaður fyri at gera lendið klárt. At játta av konto 6275 (fríðkan - Havnará).

Harumframt samtykt at bjóða rørsluamboð til eldri og spælipláss út millum 3-4 tilboðsveitarar innan økið og taka av tí lægsta, sum lýkur ásett krøv – og innan fyri ásettan karm.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 6. apríl 2011 við teirri broyting, at bjóða rørsluamboð uttandura, rørsluamboð til eldri og spælipláss út millum viðkomandi tilboðsveitarar innan økið og taka av tí lægsta tilboðnum, sum lýkur ásett krøv- og er innanfyri ásettan karm.

**82/11** **2006-3283**

**Brúgvin um Sandá**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Vísandi til málsgongd í málinum j. nr. 2001-0695, við býráðssamtykt av 22. mai 2003, hevur umsitingin umrøtt málið og er av tí fatan, at umráðandi er at kanna aðrar møguleikar fyri tilgongd til málið.

Umsitingin mælir tískil til at leita ráðgeving hjá serfrøðingum innan brúgvabygging við tí fyri eyga at fáa til vega hóskandi byggilistarligt snið, teknisk og fíggjarliga forsvarlig brúgvagerð, sum samstundis líkar krøvini hjá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða 500.000 kr at gera arbeiðs- og byggiskrá við tilhoyrandi skitsuuppskoti til støðutakan, vísandi til mannagongd fyri verkætlanum hjá Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av íløgum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini

**Býráðið 27. september 2007:** Valdir vóru Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Sambært yvirliti yvir arbeiði fíggjað av íløgum fyri 2009 (skjal nr. 2009-2360/1), eru markaðar kr. 1.000.000,- til fyrireikingararbeiði viðv. Brúnni um Sandá, sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta avsettu upphæddina á kr. 1.000.000,- til framhaldandi projektering og fyrireikingar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundum viðgjørt spurningar til framhaldandi projektering av brúnni og í sambandi við fyrireikingarnar fer nevndin m.a. at mæla til, at arbeiðið hjá nevndini eisini skal fevna um vegastrekkini báðumegin sjálva brúnna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Borgarstjórin var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

Tekniski stjóri greiddi frá málinum.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) soleiðis, at arbeiðið hjá bygginevndini eisini kemur at fevna um vegastrekkini báðumegin brúnna um Sandá.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av tilgongdini av projektering av brúnni, hevur bygginevndin á fundi 4. november 2010 viðgjørt spurningin um innihaldið í einum byggiprogrammi og hvør skal bjóða uppá hetta arbeiðið. Byggiprogrammið skal fevna um:
1. Stutt frágreiðing um byggimálið
2. Almenna endamálsorðing
3. Myndugleikagóðkenningar og galdandi reglugerðir
4. Stødd á brúgv ella frágreiðing um faktisk teknisk viðurskifti.
5. Tann bjóðandi skal definera kriteriið fyri design av brúnni.

6. Hædd skal verða tikin fyri samlaðari last á brúgv – herundir neyðugu lastkombinatiónir innan galdandi normum.
7. Hædd skal verða tikin fyri geotekniskum kanningum á staðnum.
8. Frágreiðing um bygging, logistik o.a. í hesum sambandi
9. Tekniskar veitingar
10. Evt. onnur útgerð
11. Tíðarætlan og kostnaðarmeting av brúnni
12. Kostnaður/tilboð fyri byggiprogrammið
13. Tíðarfreistin at gera byggiskránna er 6 vikur.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at:
1. Taka undir við uppskotinum um byggiprogram sambært fundarfrásøgn nr. 8 skjal nr. 2006-3283/29.
2. Biðja p/f LBF og EFLA h/f um at koma við tilboði upp á byggiprogram.
3. Beina málið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, í býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Levi Mørk var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Málið umrøtt. Verður tikið upp aftur á einum seinni fundi.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi hin 18. januar 2011 viðgjørt málið av nýggjum, og mælir til fylgjandi at leggja fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til:
1. At umsitingin við neyðugari hjálp frá ráðgevum, ger uppskot til byggiskrá at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
2. At byggiskráin tekur útgangsstøði í samtyktini í bygginevndini hin 4. november 2010
3. At talan skal verða um betongbrúgv
4. At arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum upp til 5 heildararbeiðstakarar eftir uppskoti frá umsitingini
5. At hvør tilboðsgevari kann lata inn upp til 2 uppskot
6. At umsitingin ger uppskot til dømingarkriteriir og dómsnevnd at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevndin 20. januar 2011:** Ein meirluti, Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jákup Símun Simonsen, tekur undir við tilmælinum við teirri broyting, at pkt 4: *'at arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum føroysk virki'.*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini.

**Ískoyti:**
Vísandi til pkt. 7 í tilmælinum til fíggjarnevndina hin 19. januar 2011, er av misgávum komið skeivt tal at standa um játtanina á kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011. Rættað talið er kr. 2,6 mió., sambært íløguætlan kommununar fyri 2011. Tískil verður mælt til at broyta hetta sambært niðanfyristandandi tilmæli

**Tilmæli:**
Vísandi til íløguætlan kommununar fyri 2011, mæla miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjórin fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd 20. januar 2011 og byggi- og býarskipanarnevndini 26. januar 2011, við hesi broyting av pkt. 7:

7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting av pkt. 7: At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram tilboð frá ráðgevum um byggiætlan til heildararbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Vísandi til at bert eitt tilboð kom inn, mælir býarverkfrøðingurin til at taka av tilboðnum, sent við teldubrævi tann 4. Apríl 2011 frá P/F LBF áljóðandi kr. 148.000.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og taka av tilboðnum Frá 4. apríl 2011 frá P/f LBF áljóðandi kr. 148.000.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

83/11 **2006-1053**

**Alment wc í Kirkjubø**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 21. mai 2007:** Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at seta pening av til almenn wc í Kirkjubø og rakstur.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 15. oktober 2007:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Higartil er ikki peningur settur av til verkætlanina. Søkt er um játtan í 2008 til slíkar íløgur.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til umbønina frá staðbundnu nevndini.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við áheitanini frá staðbundnu nevndini og at gera uppskot til staðseting og søkja avvarðandi myndugleikar um loyvi.

Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 5. mars 2008:** Kunnað varð um málið. Arbeitt verður við at fáa neyðug loyvir til vega, men játtan er ikki sett av til hetta arbeiðið í íløgum. Møguliga kann hetta fíggjast um raksturin.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. mai 2008:** Heitt verður á Tórshavnar kommunu um at arbeiða við eini loysn.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir biðja um status í málinum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 22. oktober 2008:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið. Málið er hjá Fornminnismyndugleikanum.

**Ískoyti:**

Staðbundnu limirnir ynskja at verða kunnaðir um heildarætlanina frá fornminnismyndugleikanum.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 9. desember 2008:** Svar er ikki komið frá Fornminnismyndugleikunum enn.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í skrivi frá Føroya Fornminnissavni, dagf. 17.12.2008, fingið upplýst, at sambært áliti um heildarætlan fyri varðveitingini av fornminnum í Kirkubø, verður mælt ikki til at gera viðskiftahús, áðrenn politisk støða er tikin til tilmælið. Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Leiðarin á lendisdeildini kunnaði um status í málinum. Nevndin samtykti at beina málið í byggi-og býarskipanarnevndina til endaliga staðseting av viðskiftahúsinum(almennum wc og buss-skýli).

**Ískoyti:**
3 uppskot eru í umboði, viðv. staðseting av viðskiftahúsi (alment wc og bussskýli). Umsitingin mælir til 3 møguleikar á trimum økjum, liggjandi í økinum H. Økið er lagt av til frílendi, úthús líknandi bygning til tænastur, men ikki íbúðarbygning.

Økini liggja á matrikkul nummar 8a (A). Vit mæla ti, at hetta økið er best egnað. Næstbest egnað er 10a (B). Triðja best egnaða økið er 20 C (C). Sí ávikavist niðanfyri, og hjáløgdu tekning:

| | |
|---|---|
| A.8a | Ognarviðurskifti: Búnaðargrunnurin fyrr (Føroya Jarðargrunnur) samb. Dóm 30.09.1999. Sí tekning: Uppskot til viðskiftahús í Kirkjubø, 09.01.1999, J.P. Gregoriussen & U. Patursson |
| B. 10a | Útbygging av kaffistovu. Gjøllari kanningar eru neyðugar |
| C. 20 c | Ognarviðurskifti Tórshavnar kommuna. |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at velja uppskot A.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd.

- Kunnað verður um status.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Kunnað varð um málið.

- Formaðurin í teknisku nevnd ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** Nevndin samtykti at heita á borgarstjóran um at taka málið upp við viðkomandi landsstýrisfólk, við støði í skrivi frá Føroya Fornminnissavni (j. nr: 2006-1053/13), vísandi til týdningin av at hava nøktandi umstøður í sambandi við ferðavinnuna og vitjandi annars. Nevndin ynskir at nýtt alment wc er uppsett áðrenn summar 2010.

Sjúrður Olsen farin av fundi.

Vísandi til skriv frá Sølvá Paturson, j nr 2006-1053/18, staðfestir nevndin, at wc verður tikið burtur áðrenn summar 2010.

- Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Málið útsett.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 18. januar 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um støðuna, eftir at borgarstjórin hevur havt fund við landsstýriskvinnuna mikudagin 3. mars 2010. Umsitingin skal eisini vísa á, at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini til viðskiftahús í Kirkjubø, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Málið útsett, tí at fundurin millum borgarstjóran og landsstýriskvinnuna varð útsettur.

**Ískoyti:**
Fundurin við landsstýriskvinnuna hin 3. mars 2010 var avlýstur av landsstýriskvinnuni.

Umsitingin hevur eisini havt samskifti við Føroya Fornminnissavn um málið. Í skrivi móttikið 30. mars 2010 svarar Fornminnissavnið, soleiðis:

> Við tað, at tær tænastur, viðskiftahúsið er ætlað til, eru alneyðugar, metir Fornminnissavnið tað verða skilabest at fremja uppskotið, ið fyriliggur. Hetta tó við tí fyrivarni, at talan er um eina fyribils loysn, av tí at nevndu tænastur fara at verða tiknar við í oman fyri nevndu yvirordnaðu økisskipanina. Vert er at gera vart við, at henda økisskipan fer at verða Tá hon fyriliggur, kann henda, at funnin verður onnur loysn á hesum tænastum, ið sampakkar við eina heild. Tá farið verður undir at fremja ætlanina til viðskiftahús eigur kommunan tí at hava hetta í huga.

Við hesi treytaðu tilsøgn ber nú sostatt til at seta eina fyribils loysn í verk. Leysliga mett vil ein detailprojektering kosta uml. kr. 150.000,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin vísa til ískoyti til fundin í teknisku nevnd 4. mars 2010, um manglandi fígging, sum nevndin má útvega áðrenn projektering og bygging verða sett í verk, og til treytaðu tilsøgnina frá Fornminnissavninum um eina fyribils loysn.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, álj. kr. 150.000,-, til at fremja omanfyri nevndu detailprojektering.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at biðja um tilboð uppá detailprojektering við støði í fyriliggjandi uppskoti. Tilboðið verður at leggja fyri fíggjarnevndina á fyrstkomandi fundi.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 26. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommunar.

**Tekniska nevnd 23. september 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at beina málið í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Fíggjarnevndin 6. oktober 2010:** Málið útsett til nærri kanningar og at leggja fyri fíggjarnevndin aftur á fyrstkomandi fundi.

**Fíggjarnevndin 17.november 2010:** Tekniski stjóri kunnaði um málið. Málið verður tikið upp í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við leiðsluna á Tekniska skúla, um at fáa í lag eitt samstarv við skúlan um bygging av viðskiftahúsi í Kirkjubø. Skúlin er sera áhugaður í at luttaka í eini slíkari verkætlan, sum skúlin so eisini vil nýta í síni undirvísing fyrra hálvár 2011. Skúlin hevur luttikið í líknandi verkætlanum fyrr – eitt nú í Koltri og á Dímun. Skúlin ynskir tó ikki at standa fyri byggiarbeiðinum, men at okkurt byggivirki stendur fyri hesum, meðan næmingar skúlans luttaka sum arbeiðsmegi í sambandi við byggingina. Skúlin skal ikki hava løn til næmingarnar fyri sína luttøku, men hevur eitt ynski um, at kommunan kann veita ein stuðul til eitt nú lestrarferð hjá næmingum.

Umsitingin hevur viðgjørt ynskini hjá Tekniska skúla, og sær ikki nakran trupulleika í at arbeiðið verður gjørt eftir tí leisti, sum skúlin mælir til. Umsitingin mælir til, at tilboð verða umbiðin frá byggivirkjum uppá byggibúningararbeiði, og at sama virki eisini stendur fyri sjálvum byggiarbeiðinum, við hjálp frá næmingum á Tekniska skúla, sum eisini ger elementir o.a. bygningslutir.

Verætlanin verður fíggjað av avlopi frá lidnum verkætlanum, har avsettar eru kr. 1,0 mió. til verkætlanina, (sí j. nr. 2010-2717).

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til:

1. at heita á fíggjarnevndina um at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av neyðugum undirlendi til viðskiftahúsið
2. at heimila umsitingini at lata upp í hendi á ráðgeva at gera byggibúningarprosjekt v.m.
3. at heimila umsitingini at gera avtalu við Tekniska skúla um, at teir prosjektera bygningin sum ein timbur-element bygning og gera neyðugu bygningslutirnar í hesum sambandi
4. at kommunan rindar fyri tilfar, ið Tekniski skúlin nýtir til verkætlanina
5. at heimila umsitingini at bjóða byggibúningararbeiðið v.m. út sum undirhondsboð so skjótt avtala er gjørd um undirlendið.

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 13. desember 2010:** Kunnað varð um málið.

Nevndin vísti á manglar so sum handikap-wc, skiftirúm til smábørn o.o. Biðið verður um at síggja endaliga tekning, áðrenn byggingin byrjar.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur latið gera dagført myndugleikaprojekt til góðkenningar. Uppskotið tekur støði í áður gjørdum uppskotum við eyðkenni í tí gamla føroyska byggisniðinum.

Greitt verður frá fyriliggjandi upspkoti.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna uppskotið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. februar 2011:** Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur latið gera dagført myndugleikaprojekt til góðkenningar. Uppskotið tekur støði í áður gjørdum uppskotum við eyðkenni í tí gamla føroyska byggisniðinum.

Greitt verður frá fyriliggjandi uppskoti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at góðkenna uppskotið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og góðkenna fyriliggjandi uppskot og játta 1,0 mió. kr. til verkætlanina av lokaðum verkætlanum fyri 2010 (j.nr. 2010-2717).

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til 2. desember 2010 tó við teirri broyting at pkt. 5 verður orðað soljóðandi:

> at heimila umsitingini at gera avtalu við arbeiðstakara um at standa fyri betong-, timbur- og snikkaraarbeiðinum saman við tekniska skúla og at kommunan sjálv stendur fyri grevstrar- og planeringsarbeiði við hartilhoyrandi grevstri fyri veitingum (kloakk, vatn og el).

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og gera avtalu við arbeiðstakara um at standa fyri betong-, timbur- og snikkaraarbeiðinum saman við tekniska skúla og at kommunan sjálv stendur fyri grevstrar- og planeringsarbeiði við hartilhoyrandi grevstri fyri veitingum (kloakk, vatn og el).

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**84/11** **2005-2467**

**Innangarðsútskifting av Hest bygd**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Matrikulstovan fráboðar Tórshavnar kommunu í skrivi, dagfest 22. september 2005, at farið verður í gongd við innangarðsútskifting av Hest bygd.

Vanligt er at kommunur nýta henda møguleika at ognartaka lendið til øll almenn endamál smb. § 22. Hetta er tí, at tað ognartikna lendið verður latið av øllum eigindómum, og endurgjaldið verður latið yvir útskiftingarroknskapin.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at kommunan fyribils ognartekur lendið sambært hjálagda korti, dagf. 1. nov. 2005, tíh.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2005:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at Tórshavnar kommuna ognartekur omanfyrinevndu øki til sethúsabygging, og at málið verður lagt fyri hest- og koltursnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2005:** Vísandi til at fundarfrásøgnin frá 7. november 2005 var skeivt skrivað, samtykti nevndin at beina málið í hest/koltursnevndina til ummælis.

**Hest-koltursnevndin 1. februar 2006:** Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum.

Eisini verður mælt til, at Tórshavnar kommunan ognartekur lendið millum vegin og havnaøkið.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2006:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**

Matrikulstovan hevur nú gjørt eitt fyribils uppskot til innangarðsútskifting av Hest bygd. Í hesum sambandi hevur borgarafundur verið, og partarnir hava havt møguleika til at mótmæla og koma við broytingaruppskotum, áðrenn tað endaliga uppskotið verður lagt fram.

Viðv. tí lendinum, sum kommunan ætlar at ognartaka, hava verið einkultar viðmerkingar. Tí verður skotið upp, at økini verða broytt sambært tilmælinum frá býararkitektinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at:
1. øki 105 verður strikað, meðan øki 106 verður víðkað niðan til garðin, sum víst á viðlagda korti.
2. øki 104 er broytt, sum víst á viðlagda korti.
3. øki 103 er óbroytt.
4. økini 101 og 102 eru løgd saman og broytt soleiðis, at møguleiki er at gera "atgongd" til økini 103 og 104, uttan at fara inn í bygningarnar fram við núverandi gøtu. Viðmerkjast skal, at bygningurin, sum kemur at liggja í nýggja øki 102, er gamla elektrisitetsverkið.

Útskiftingin ætlar at halda tað ætlaða ognartiknað metið, soleiðis at fyribilsplanurin nærum kann nýtast sum endaligur planur.

**Hest-koltursnevndin 27. september 2006:** Nevndin tekur undir við býararkitektinum, tó má hædd takast fyri økið 102, sum má víðkast til eisini at fevna um fótbóltsvøll - sí tekning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum og hædd verður tikin fyri áheitanini frá staðbundnu nevndini.

**Ískoyti:**
Málið hevur ligið hjá Umhvørvisstovuni eina tíð, men er nú tikið uppaftur. Samráðingar hava verið við Umhvørvisstovuna-Matrikulstovuna tann 17. februar 2011, har avtalað varð, at tillaga økini til aktuella tørvin. 1. mars 2011 kom endurskoðað uppskot til ognartøku frá Matrikulstovuni, og mælir umsitingin og býararkitekturin nevndini til at taka undir við hesum fyribilsuppskotinum. Tá fyribilsuppskotið er staðfest, og møguligar smærri tillagingar gjørdar, verður ein endalig fullfíggjað ognartøkusamtykt løgd fyri býráðið, umvegis avvarðandi nevndir.
Fíggjarlig binding fyri kommununa verður uml. 40 kr/m²x 6.135 m² = 245.400 kr. íroknað er tá endurgjald fyri mist bitrættindi á kr. 4,80/m².

Sí hjáløgdu kortskjøl:
Skriv um ognartøku 1.02.2011
Listi yvir eigarar og broytt ognarviðurskifti
Kortuppdráttur av uppskoti

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Tikið av skrá.

**85/11** **2010-2002**

**Kongabrúgvin**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sambært skitsuuppskotum fyri miðbýin, hevur býarskipanardeildin m.a. arbeitt við at gera økið framvið bryggju til ein meira aktivan part av miðbýnum.

Verandi skitsuuppskot á Kongabrúnni er ein liður í hesari ætlan, sum hevur til endamáls at umskipa plássið við munnan av Havnará til eitt uppihaldsøki.
Umsitingin hevur gjørt uppskot til uppihaldsøki, sí viðheftu tekningar og j.nr. 2010-2002/3.

Ì uppruna skitsuuppskoti fyri miðbýin var ætlanin at fremja alt plássið framvið Kongabrúnni niðan til Essaba, sí j.nr. 2010-2002/2. Ávísar broytingar eru gjørdar í sambandi við uppruna uppskot.

Verandi uppskot til Kongabrúnna er fyrsti liður til eina víðari ætlan, sum hevur í fyrstu atløgu atlit til parkering og alt plássi, sum eftir ætlan skal gerast seinni.

Trý føst bátapláss verða tikin burtur, um verandi uppskot verður framt. Umframt tey trý føstu bátaplássini eru pláss til smærri bátar, sum gummibátar, sum mugu takast burtur. Tórshavnar Havn meina, at hetta ikki er í lagi at taka bátaplássini burtur, vegna plásstrot av bátum í Havn; men vísa á, at tað er møguligt at leggja bummar frammanfyri verandi uppskoti, har ið Tórshavnar Havn kann hava smærri bátar.
Kostnaðarmeting er gjørd, og mett er, at kostnaðurin at er 614.744,00 uttan mvg.

Býarskipanardeildin ætlar at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðkennir uppskotið, soleiðis at arbeiðast kann við at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2011:** Nevndin samtykti at senda málið í havnarnevndina til ummælis.

**Havnanevndin 11. apríl 2011:** Verður ætlanin framd, samtykti ein meiriluti í havnarnevndini Jákup Símun Simonsen, Halla Samuelsen, Jógvan Arge og Levi Mørk, at bátabummar verða lagdir frammanfyri, soleiðis at samlaða talið av bátaplássum ikki minkar og at hetta verður gjørt og fíggjað sum ein partur av ætlanini.

Ein minniluti Jan Christiansen tekur ikki undir við ætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2011:** Bogi Andreasen og Levi Mørk taka undir við tilmælinum til fundin 4. apríl 2011, tó soleiðis at samlaða talið av bátaplássum ikki minkar.

Jógvan Arge og Halla Samuelsen vísa á sína støðu í havnarnevndini.

Ein minniluti: Jan Christiansen vísir til sína støðu í havnarnevndini 11. apríl 2011. Nevndin beinir málið víðari í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2011: Fíggjarnevndin 14. apríl 2011:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov samtykti at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 4. apríl 2011. Harafturat mælir fíggjarnevndin býráðnum til at taka undir við meirilutanum í havnanevndini 11. apríl 2011 um at bátabummar verða lagdir frammanfyri, soleiðis at samlaða talið av bátaplássum ikki minkar og at hetta verður gjørt og fíggjað sum ein partur av ætlanini. Arbeiðið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 9 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddi: Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Anfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

**86/11** **<u>2010-1335</u>**

**<u>Umsókn um byggiloyvi til nýggjan skrivstovubygning við Tinghúsvegin/Bøkjarabrekku, matr. nr. 414b og 414e, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Teknistovan Magnus Hansen Sp/f søkir vegna Havnar Arbeiðsmannafelag um byggiloyvi til nýggjan skrivstovubygning við Tinghúsvegin/Bøkjarabrekku, à matr. nr. 414b og 414e.

Í hesum sambandi verður eisini søkt um at byggja við frávik.

Umsóknin til byggiloyvið til nýggja skrivstovubygningin er ikki liðugt viðgjørd, men fyri at stytta um byggimálsviðgerina sum heild, er tað umráðandi, at fáa avgreitt tann partin ið hevur við frávikið at gera, so skjótt sum til ber.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í serstøku byggisamtyktini fyri øki innanfyri Bøkjarabrekku, Tinghúsveg, Sverrisgøtu og Niels Finsens gøtu í 1. grundumráði í almennu samtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Á matr. nr. 414e, 414b er ábygt skrivstovubygningur hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, ið skal takast niður, og nýggjur byggast í staðin.
Á matr. nr. 419 er ábygt skrivstovubygningur hjá Landsverk
Byggistig: Ongin áseting er í serstøku byggisamtyktini um byggistig, men loyvt er at byggja út í mark.
Nettonýtslustigið verður 2,12. Mest loyvda er 2,5.
Hædd til mønu verður umleið 16,5. Mest loyvda er umleið 14 m.

Í ásetingunum í serstøku byggisamtyktini fyri økið er **ikki loyvt at byggja útum byggifeltini.**

Sambært, *§ 4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA,* kann tað bert byggjast innan fyri byggifeltini, og skal øll bygging byrja frá markinum ið avmyndar økið ið serstaka byggisamtyktin lýsir, og inneftir.

*Stk. 1.* Ikki er loyvt at byggja inn um ásettu økisfrámerkingar fyri hvørt øki sær, til nakrar síðu.

*Stk. 3.* Hús mugu ikki verða bygd hægri enn ásett er í fylgiskjali 1, fyri hvørt einstakt byggifelt. Hægst loyvda byggihædd er ásett við kotum eftir markalinjuni, ið avmarkar økið ið byggisamtyktin fevnir um. Eingin partur av húsinum, yvirgrind ella møn o.s.f.v mugu koma upp um stiplaðu linjuna. Undantaksloyvi kann tó verða givið fyri elevatorhúsum, ventilatiónshúsum ella øðrum lágum, løttum og smærri bygningum, ið fella natúrligt inn í skapi á húsinum og sum byggimynduleikin metir ikki sjónligt økir um húsahæddina.

*Stk. 6.* Byggingin skal haldast innan fyri ásettu treyturnar í hvørjum einstøkum byggifelti.

**Frávik 1) :**
Her verður søkt um at byggja tveir útbygningar – báðir fara útum byggifeltið.
Á nýbygninginum, í 4., 5. og 6. hædd á eystursíðuni, móti Tinghúsvegnum, er útbygningur (karnappur), 4,65 m x 0,9 m í vídd og 11,19 m høgur. Fríhæddin frá gongubreyt upp undir útbygningin er 4,8 m.
Tilsvarandi, bert í 4. og 5. hædd á norðursíðuni, móti Bøkjarabrekku er útbygningur (karnappur), 3,28 m x 9,91 m í vídd og 8,69 m. Fríhæddin frá gongubreyt upp til útbygningin er 4,9 m.

**Frávik 2):**
Her verður søkt um at byggja uppi á tekjuni, omaná 5. hædd. Ætlanin er at byggja fundarhøli, 2 wc og te-køk. Hesin partur av bygninginum fer uppum horisontalu byggilinjuni upp á umleið 14 m, javnfjarð við lendið móti Tinghúsvegnum, ið er tað mest loyvda.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn til frávik, j.nr. 2009-1335/13.
Chekklisti, j.nr. 2009-1335/2.
Fráviksskjal, j.nr. 2009-1335/19.
Tilfar til fundin Skjal nr. 01, 02, 03, 04, 05, 06.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at umsóknin verður gingin á møti vísandi til omanfyri nevndu frágreiðing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**-Ískoyti:**
8. febuar 2011 eru nýggjar dagførdar tekningar innkomnar, ið vísa, at fundarhølið, ið áður var á 6. hædd er tikið burtur, eins og karnapparnir móti Tinghúsvegnum og Bøkjarabrekku eisini eru tiknir burtur. Sí tekn: "*Uppskot 2. til fritthangandi fundarhøli á 5. hædd, dagfest 16.11.2010*".

Nýggj fundarhøli eru nú í 5. hædd, fest inn í hornið á verandi bygningi og borin uppi av betongsúlum í mark móti Ebenezer. Brunateknisk frágreiðing frá RMG-lnspektion og grannaváttan frá Ebenezer eru eisini viðlagdar umsóknini.

Í túninum undir terassuni á 1. hædd verða gjørd 6 stk. parkeringsbásar. Hartil er ætlan at fylla upp í túninum og at planera túnið, soleiðis at koyrast kann inn frá Bøkjarabrekku út á Sverrisgøtu.

**Relativa tíðarætlan fyri byggingina:**
Samlað byggitíðin verður 15 mánaðir ella 60 vikur.
Eftir at bygningurin er innilokaður, 32 vikur, kunnu innhegningar v.m. takast niður, soleiðis at ferðslan á Tinghúsvegnum og í Bøkjarabrekku ikki verður darvað. Fram til tá er ynskiligt, at Tinghúsvegurin verður minkaður niður í eina vegabreyt, meðan syðra gongubreytin á Bøkjarabrekku verður partur av arbeiðsplássinum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í serstøku byggisamtyktini fyri økið innanfyri Bøkjarabrekku, Tinghúsveg, Sverrisgøtu og Niels Finsensgøtu í 1. grundumráði í almennu samtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Á matr. nr. 414e, 414b er ábygt skrivstovubygningur hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, ið skal takast niður, og nýggjur byggast ístaðin.
Á matr. nr 419 er ábygt skrivstovubygningur hjá Landsverk.
Byggistig: Ongin áseting er í serstøku byggisamtyktini um byggistig, men loyvt er at byggja út í mark.
Nettonýtslustigið verður 2,496. Mest loyvda er 2,5.
Hædd til mønu verður umleið 14 m. Mest loyvda er umleið 14 m.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Bentley støðumynd
Tíðarætlan, skjal nr. 2010-1335/32
Tekn. nr. A-1000 – A-1022, skjal nr. 2010-1335/27.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti við treytum sum umsitingin setur og møguligar treytir sum aðrir myndugleikar seta.
Eisini verður mælt til at senda málið í teknisku deild í sambandi við byggiplássinnrættan, ferðslu og annað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars. 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 22. mars 2011:** Ferðslunevndin metir, at koyribreytin á Bøkjarabrekku ikki má verða nervað av byggingini, vísandi til at pláss skal verða fyri neyðsynjakoyring.

Á gongubreytini, sum verður sperrað, skulu fótgangarar verða vístir til gongubreyt á norðari síðu, og skeltingin til fótgangarnar skal verða staðsett við R.C. Effersøes gøtu og við Niels Finsens gøtu.

Ferðslunevndin mælir eisini til at Tinghúsvegurin millum Sverrisgøtu og Bøkjarabrekku verður stongdur, meðan arbeiðið fer fram.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at sperra Tinghúsvegin, men at seta umsøkjaranum sum treyt fyri byggiloyvinum, at tunnil/brúgv verður gjørd til eina koyribreyt og gongubreyt á eystaru síðu á ovasta parti av Tinghúsvegnum.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við ferðslunevndini, tó at Tinghúsvegurin, millum Sverrisgøtu og Bøkjarabrekku, verður stongdur í mesta lagi 32 vikur. Nevndin samtykti eisini, at arbeiðsøkið skal stongjast fyri øllum óviðkomandi.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Atkvøtt varð um tilmælið frá tekniska stjórannum og býarverkførðinginum, ið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Maria H. Olsen og Annfinn Brekkstein

87/11 **2011-0341 (sí eisini mál nr. 2009-1547)**

**Tíðaravmarkað parkering í miðbýnum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í framhaldi av viðgerð av málinum um parkeringspoltikk (mál nr 2009-1547), hevur fíggjarnevndin á fundi 19. januar 2011 m. a samtykt at heita á teknisku nevnd um beinanvegin at gera uppskot um tíðaravmarkaða parkering í miðbýnum.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur uppskot um tíðaravmarkaða parkering í miðbýnum sambært áheitan frá fíggjarnevndini 19. januar 2011 til umrøðu.

Víst verður á, at tað ikki fyriliggja upplýsingar um avleiðingar fyri møguligum størri ferðslutrýsti á veganetinum nærhendis teimum p-plássum, har tíðaravmarking verður gjørd. Er ynski um at fáa staðfest møguligar avleiðingar av hesum, er neyðugt at fáa til vega framskrivaðar ferðslumetingar.

**Ferðslunevndin 31. mars 2011:** Ferðslunevndin hevur umrøtt framlagda uppskot um tíðaravmarkað parkering (plantekning mál nr. 2011-0341/7) á hesum støðum

1. P-øki á Svínaryggi
2. P-øki á Skálatrøð
3. P-pláss á Glaðsheyggi
4. P-økið á Frúutrøð
5. P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu)
6. P-økið við Skansatovu Yviri við Strond
7. P-økið undir Glasheyggi

Við støði í uppskoti til Parkeringspolitikk fyri Tórshavnar Kommunu, metir nevndin tað vera neyðugt at kanna møgulig árin av størri ferðslutrýsti á kommunala vegaøkinum nærhendis parkeringsplássunum, um tíðaravmarkingin verður:

1. P-øki á Svínaryggi, tíðaravmarking 4 tímar
2. P-øki á Skálatrøð, tíðaravmarking 4 tímar
3. P-pláss á Glaðsheyggi, tíðaravmarking 2 tímar
4. P-økið á Frúutrøð, tíðaravmarking 4 tímar
5. P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu) , tíðaravmarking 4 tímar
6. P-økið við Skansatovu Yviri við Strond, tíðaravmarking 4 tímar
7. P-økið undir Glasheyggi, tíðaravmarking 1 tíma

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at umsitingin kannar møguligar avleiðingar av framlagda uppskotinum um tíðaravmarkaða parkering, áðrenn farið verður undir at seta arbeiðið í verk, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Jákup Símun Simonsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Levi Mørk, tekur undir tíðaravmarkingini:

1. P-øki á Svínaryggi, tíðaravmarking 4 tímar
2. P-øki á Skálatrøð, tíðaravmarking 4 tímar
3. P-pláss á Glaðsheyggi, tíðaravmarking 2 tímar
4. P-økið á Frúutrøð, tíðaravmarking 4 tímar
5. P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu) , tíðaravmarking 4 tímar
6. P-økið við Skansatovu Yviri við Strond, tíðaravmarking 4 tímar
7. P-økið undir Glasheyggi, tíðaravmarking 1 tíma
   tó so, at tíðaravmarkingin fyri P-økið á Skálatrøð fær tíðaravmarking á 8 tímar.

**Tilmæli**

Til tess at fáa partar av málinum avgreiddar og settar í verk sum skjótast, mælir borgarstjórin til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd, við hesi broyting av pkt. 1 og 2:

1. P-øki á Svínaryggi, tíðaravmarking 4 tímar at seta í verk beinanvegin
2. P-øki á Skálatrøð, tíðaravmarking 4 tímar á helvtini av økinum og 6 tímar á hinari helvtini av økinum at seta í verk beinanvegin
3. P-pláss á Glaðsheyggi, kannast áðrenn íverksetan
4. P-økið á Frúutrøð, kannast áðrenn íverksetan
5. P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu) , kannast áðrenn íverksetan
6. P-økið við Skansatovu Yviri við Strond, kannast áðrenn íverksetan
7. P-økið undir Glasheyggi, kannast áðrenn íverksetan

**Býráðið 14. apríl 2011:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Sjúrður Olsen og Levi Mørk um, at tíðaravmarkingin verður:

1. P-øki á Svínaryggi, tíðaravmarking 4 tímar
2. P-øki á Skálatrøð, tíðaravmarking 8 tímar

ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Atkvøddu ikki: Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen

**88/11** **2011-0526 GHM**

**Nýggj parkeringspláss**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur, eftir áheitan frá borgarstjóranum, gjørt eitt uppskot um fleiri parkeringspláss í miðbýnum við tíðaravmarkan.

Uppskotið verður framlagt til umrøðu.

**Tekniska nevnd 10. mars 2011:** Nevndin samtykti at beina málið í ferðslunenvdina.

**Ferðslunevndin 22. mars 2011**: Ferðslubólkurin tekur málið upp til viðgerðar at leggja fyri ferðslunevndina aftur.

**Ískoyti:**
Málið verður viðgjørt aftur á fundi í ferðslunevnidni 31.03.2011.

**Ferðslunevndin 31. mars 2011:**
Økið við Havnagøtu/Bursatanga (sí plantekning mál nr. 2011-0526/6):

Øki A:
Grundað á at vegabreiddin á hesum øki gerst ov smøl, um parkering verður loyvd á norðari síðu, verður mælt frá at staðseta parkeringsplássini sambært framlagda uppskoti.

Víst verður á at mest loyvda ferð er 50 km/t og rekkverkið móti økinum hjá Tórshavnar havn ger, at vegabreiddin verður ov smøl.

Øki B:
Mælt verður til at taka undir við framlagda uppskotinum, tó uttan at parkeringsbásar verða gjørdir hinumegin Havnagøtu (móti verandi parkeringsøkinum á Bursatanga).

Mett verður at breiddin á koyribreytini gerst ov smøl, um básar verða staðsettir á báðum síðum, vísandi til at inn- og útkoyring frá parkeringsbásunum í einum øki, har nógv ferðsla er, fer at verða til ampa.

Øki C:
Tikið verður undir við uppskotinum.

Málið verður at viðgera framhaldandi á næsta fundi.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Málið útsett.

**Tilmæli:**
Til tess at fáa partar av málinum avgreiddar og settar í verk sum skjótast, og við støði í viðgerðini í ferðslunevndini 31. mars 2011, mælir borgarstjórin til:

Øki B:
Mælt verður til at taka undir við framlagda uppskotinum, har parkeringsbásarnir á norðaru síðu verða gjørdir í hesum økinum.

Øki C:
Mælt verður til at takað undir við uppskotinum um parkeringspláss á kaiini á Bursatanga.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**FUNDUR LOKIN KL. 21:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |